Sosialurin

...títt vinnublað






VINNAN

VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Hugurin drívur verkið

**Tað eru ikki bert lokal tíðindi, ið tú finnur á sandoyarportalinum. – Portalurin er merktur av, at hann er her í oynni. Kortini er tað ein portalur fyri allar Føroyar, sigur Terji Dalsgaard, ritstjóri**

TÍÐINDAFLUTNINGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru umleið trý ár síðani, at Terji Dalsgaard byrjaði at leggja tíðindi út á heimasíðuna hjá BKV, sum er navnið á bókhaldsvirkinum hjá honum.

– Orsøkin til, at eg byrjaði við tí, var at fáa fleiri vitjandi inn á heimasíðuna hjá virkinum. Og tað hevur eydnast so væl, at vit hava gjørt ein Sandoyarportal burturav, sigur Terji Dalsgaard.

Hesin nýggi portalurin eitur Sandportal.fo.

– Hann hevur fingið ógvuliga góða undirtøku. Ein dagin í farnu viku høvdu vit 298.000 klikk, og tað er allastaðnis frá í heiminum. Flestu uttanlands vitjanir eru úr Danmark, síðani Noregi, Íslandi og so øll skipini, har føroyingar eru umborð, sigur Terji Dalsgaard.

Men eisini so langt burturi sum Afrika og Amerika eru vitjandi á Sandportal.fo

Sandoyarportalurin ber so at siga øll tíðindi.

– Mær dámar væl at skriva um fisk, og so leggi eg eisini andalig tíðindi inn. Í veruleikanum øll sløg av tíðindum, sigur Terji Dalsgaard.

Hann sigur, at sjálvt um tað eitur Sandportal.fo, so er tað eisini ein Føroyaportalur, sum er fyri alt landið.

– Sjálvandi umgongst ikki, at tá portalurin er her í oynni, so verður tað nógv lokalt eisini. Talan er um øll sløg av tíðindum, men nakað, sum eg havi lagt til merkis við portalum er, at teir ikki hava so nógv andalig tíðindi, og tað ætla vit at leggja okkum eftir at hava, sigur Terji Dalsgaard.

Hann sigur, at tað andaliga fyllir ikki so nógv á portalunum, og tey, sum lesa hetta, eru ógvuliga fegin um, at hann ger so mikið nógv burtur úr. Eisini merkir hann hetta væl umborð á skipunum.

– Eg fái nógvar afturmeldingar um júst hetta, sigur Terji Dalsgaard.

## Dámar væl at skriva

Hann roynir eisini at leggja seg eftir at hava nógvar myndir inni á portalinum, eisini myndarøðir.

– Tað hevur alt at siga. Internetið er soleiðis hóttað, at ein flott mynd skal fylgja við, og tað leggi eg ómetaliga stóran dent á. Myndin er nummar eitt á internetinum, og tá eg leggi út á portalin, geri eg altíð skjótt av. Eg skrivi skjótt og leggi skjótt út, men myndina leggi eg stóran dent á, sigur Terji Dalsgaard.

Eitt annað, sum ritstjórin á sandoyarportalinum ætlar sær at gera nógv við, eru kykmyndir.

– Vit hava so seint sum í dag verið og tikið børnini upp í skúlanum her á Sandi, meðan tey sungu morgunsang, og tað fara vit nú at leggja eitt brot út av. Vit hava eisini fingið eitt filmklipp frá einum norskum báti, har ein skopuningur er við, og tað liggur so úti nú, sigur Terji Dalsgaard.

Hann byrjaði portalin fyri at fáa fleiri vitjandi inn á heimasíðuna hjá fyritøku sínari, men tað var ikki einasta orsøkin.

– Ein orsøkin til, at eg fór undir hetta var, at mær dámar ógvuliga væl at skriva. Tað var heldur ikki so nógv virksemi í økinum tá, men nú er stórur aktivitetur, og vit hava eisini víðkað okkara virksemi, so vit hava eina deild í Havn.

Men hugurin at skriva merkir eisini, at eg havi ein ógvuliga langan arbeiðsdag. Og tað er ikki ein átta tíma dagur, sigur Terji Dalsgaard.

So tað er meira hugurin, sum drívur verkið heldur enn at tað eru so stórir møguleikar í hesum fíggjarliga.

– Nei, tú spinnur ikki gull úr einum slíkum portali, so tað er hugurin, sum drívur verkið. Tað skal eitt øgiligt arbeiði til, og eg arbeiði nógv, rættiliga nógv, sigur Terji Dalsgaard.

Kortini ætlar hann sær ikki at gevast á hondum.

– Sandoyarportalurin verður dagførdur fleiri ferðir um dagin. Treytin fyri at hava ein portal er, at hann er livandi. Neyðugt er at leggja nýggj tíðindi út gjøgnum allan dagin, og tað hevur tað altíð verið gjørt hjá okkum, sigur Terji Dalsgaard, ritstjóri á sandoyarportalinum.



*Terji Dalsgaard hevur havt sandoyarportalin í eini trý ár. At byrja við var hetta ein partur av heimasíðuni hjá roknskaparvirki hansara, men nú er talan um sjálvstøðugan portal, ið kallast sandportal.fo*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK





HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich